## Seks kvinnur hjá Ibsen

Kvinnudagin, leygardagin 8.mars, fer norska leikkvinnan Juni Dahr at framføra sín egna monolog „Ibsen kvinner - set en ørn i bur“ í Norðurlandahúsinum. Í leikinum eru lýstar seks kvinnur hjá Henrik Ibsen: Hilde úr „Byggmester Solness“, Hedda úr „Hedda Gabler“, Fru Alving úr „Gengangere“. Nora úr „Et dukkehjem“, Elida úr „Fruen fra Havet“, Hjørdis úr „Hærmændene paa Helgeland.“. Juni Dahr hevur framført monologin í næstan øllum heimspørtum, og hon hevur fingið virðislønir fyri leikin. Sjálv sigur Juni, at hon heldur, at hóast Ibsen skrivaði sínar kvinnulýsingar fyri meira enn 100 árum síðani, eru tær framvegis viðkomandi. Ibsen var sera vísur, og hann dugdi framúr væl at lýsa kvinnulyndið í øllum sínum margfeldi. Danski floytuleikarin Chris Poole spælir tónleikin í leikinum „Ibsen kvinner - set en ørn i bur.“ Norðurlandahúsið, Norrøna Felagið í Føroyum og Tjóðpallur Føroya skipa fyri vitjanini hjá Juni Dahr og hennara fólkum.

## Konsert og DJ Show í Fuglafirði

Leygardagin 8 mars verur konsert og DJ Show í Mentanarhúsinum í Fuglafirði við bólkunum Synarchy, Ineptus & Alone I Break. Aftan á konsertina verur Dj Show við Dj Sleize, og Beerserkers spæla nøkur løg. Einki aldursmark er, og konsertin byrjar kl. 21:00.



*Útsýnið verður óført út yvir Havnina, Nólsoyarfjørð og Nólsoy. Valbjørn Dalsgarð stendur her inni í fyrstu raðhúsunum, sum verða gjørd*
*Mynd: Marika Hill*

# Væl framanfyri tíðarætlanina



*Valbjørn við íbúðúðunum í baksýni. Í løtuni arbeiða 38 mans upp fyrsta byggistig av trimum, sum tilsamans fer at kosta hálva milliard*
*Mynd: Caroline Eriksson*

**Meðan byggigøla eftir byggjugølu kemur undan kavi, gongur framúr hjá Valbjørn Dalsgarð undir Kongavarða. - Vit eru frammanfyri tíðarætlanina, og prísirnir fara at halda, sigur Valbjørn Dalsgarð**

BYGGING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

- Fyrstu raðhúsini verða klár at flyta inn í til jóla.

Tað sigur Valbjørn Dalsgarð, byggimeistari, sum stendur fyri einari risastórari byggiætlan undir Kongavarða.

Fyrsta byggistig umfatar 87 eindir. Talan er um raðhús og íbúðir, og mánadagin varð farið undir at seta fyrstu elementini upp til raðhúsini.

- Tað hevur gingið sera væl. Vit byrjaðu arbeiðið 18. januar í fjør, og eftir tíðarætlanini skuldu vit byrja at seta elementir upp seinast í hesum mánaðinum, men vit byrjaðu longu nú mánadagin, sigur Valbjørn Dalsgarð.

Fyrsta byggistig umfatar 32 raðhús og 55 íbúðir. Raðhúsini eru í tveimum støddum, tólv raðhús á 150 fermetrar og 20 raðhús á 207 fermetrar.

- Tey minnu raðhúsini eru øll seld, meðan nøkur av teimum størru eru eftir enn, sigur Valbjørn Dalsgarð.

Av teimum 55 íbúðunum er onkur einstøk eftir enn, sum ikki er seld, so tá hugsað verður um, at ikki kann flytast inn fyrr enn einaferð fyrst í komandi ári, sær ikki so galið út.

Íbúðirnar eru í ymsum støddum, tær minstu eru 46 fermetrar, meðan tær størstu eru á 131 fermetrar. Síðani liggja aðrar støddir ímillum, eitt nú eru nakrar 80 fermetrar, aðrar 102 fermetrar.

### Prísirnir halda

Sum nevnt er arbeiðið væl framman fyri tíðarætlanina.

- Sum eg nevndi eru fyrstu elementini longu sett upp nú, meðan tíðarætlanin segði seinast í mars. Og tá vit koma longur fram í tíðina vænta vit, at klárt verður at flyta inn í fyrstu raðhúsini til jóla. Tíðarætlanin sigur annars mai komandi ár, sigur Valbjørn Dalsgarð.

Hann er heldur ikki bangin fyri, at tær byggigølur, sum hava verið í seinastuni, eisini fara at raka hann.

- Nei, tað hava vit einki merkt til. Tað einasta, sum er komið eitt sndur óvart á, er broytingin í MVG-lógini, sigur Valbjørn Dalsgarð s u m leggur dent á, at prísirnir fara at halda.

Og prísirnir á raðhúsunum eru fyri tey minnu (150 fm) 2,4 milliónir krónur og fyri tey størru (207 fm) 2,9 milliónir.

Íbúðirnar kosta eisini eftir stødd, sjálvandi, og tær bíligastu (46 fm) kosta 600.000 krónur, meðan tær størstu (131 fm) kosta 2,6 milliónir krónur.

Næsta byggistig er longu lagt til rættis og hetta verður upp aftur størri enn fyrsta byggistig. Tað fer nevniliga at umfata eitthundrað eindir, og fer eins og fyrsta byggistig at verða ein blanding av raðhúsum og íbúðum í ymsum støddum.

- Talan verður eisini um eitt triðja byggistig, men enn er støða ikki tikin til hetta.

Tað verður gjørt, tá annað byggistig fer at líða, sigur Valbjørn Dalsgarð, sum er vælnøgdur við gongdina í fyrsta byggistigi.